# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SPARA FRAM EFTIR FUMMUM

At byggja røktarheim til tess at útvega fleiri røktarheimspláss, og so at niðurleggja røktarpláss, tí vit byggja røktarheim, tað er í øllum førum so ólogiskt, sum tað kann vera. Men hetta er í øllum førum ætlanin hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum, Rósu Samuelsen.

Vit hava á hesum stað fleiri ferðir viðgjørt tann veruleika, at tað altíð eru tey veiku, sum verða ofrað í sparingum. Vit hava nevnt sparingarnar í skúlaverkinum, har tað fyrst og fremst gongur út yvir næmingar við serligum tørvi, síðani eru tað tímarnir, sum játtaðir vórðu til tess at bøta um pisa-úrslitini, sum eisini verða spardir burtur. Automatiska javningin av fólkapensjónunum skal sparast burtur, og síðsta dømið er, at røktarpláss skulu niðurleggjast í sambandi við at røktarheim verða bygd.

Vit settu spurningin við legitimitetin hjá Javnaðarflokkinum, tá hann er partur av hesum margháttliga politikki, sum í øllum førum gongur beint upp á tvørs av hugsjónini hjá Javnaðarflokkinum. Men nú meldar so Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður og talsmaður hjá Javnaðarflokkinum, púra greitt út, at spariætlanirnar hjá Rósu Samuelsen eru hjartaleysar, og at flokkurin als ikki tekur undir við teimum.

Harvið hava vit so fingið greiðu á hugsanini hjá einum av samgonguflokkunum. Spurningurin er so, um Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin taka undir við at niðurleggja røktarpláss.

Men er politikkur kortini so einfaldur, at Javnaðarflokkurin nú kann seta seg í andstøðu til landsstýriskvinnuna, sum eftir øllum at døma ikki vil koma í somu støðu sum Jacob Vestergaard við inntøkutrygdini. Samgongan hevur gjørt ein játtanarkarm. Hesum karmi hevur Javnaðarflokkurin atkvøtt fyri - og sambært hesum játtanarkarmi skulu sparingar setast í verk. So kunnu vit hóskandi spyrja, um høgra hond ikki veit, hvat vinstra ger...



**Rósa vil ikki enda sum Vestergaard**

Oman á alt hetta, so hevur samgongan eisini gjørt av, at lønarkarmurin til almennar lønir ikki skal vaksa. Skorið út í papp merkir tað, at um lønarvøkstur verður - og tað verður tað - so skulu tilsvarandi almenn størv sparast burtur. Ergo: Færri skulu arbeiða hjá tí almenna.

Atarbeitt verður fram eftir fummum er sjón fyri søgn.

# Nýggjar bøkur við Herviliga Henry

Herviligi Henry og fótbóltshetjan og Herviligi Henry og øgiliga óreina tíðarmaskinan.

So komu tær endiliga. Nýggju bøkurnar um Herviliga Henry, barnið, sum øll elska at hata. Tú veitst, at har sum Henry er, har hendir okkurt stuttligt. Henry ger nevniliga skálkabrøgd, so tú ringir teg saman av látri.

Bókin Herviligi Henry og fótbóltshetjan er serliga aktuell júst nú, HM er á skránni. Les um, hvussu Henry oyðileggur fótbóltsdystin, hvussu hann lúrir í dagbókina hjá Frálíka Fríðriki, tá hann fer á fína matstovu at eta sninglar og ikki minst, hvussu tað gongur, tá Frálíki Fríðrikur hevnir seg.

Bøkurnar um Herviliga Henry eru sera væl umtóktar millum børn, og nú er eisini teknifilmsrøð og telduspøl gjørd um hann.

Tað er Francesca Simon, sum hevur skrivað bøkurnar, ið eru týddar til 20 mál. Tony Ross hevur myndprýtt bøkurnar, og Bergur Rasmussen hevur týtt.

Bøkurnar eru umleið 102 og 88 bls. og kosta 90 krónur fyri hvørja.



# Halda jóansøku í Fuglafirði

Í kvøld klokkan 19 verður jóansøkuhald í Fuglafirði við eldstað Tórs heimi á Oyruni.

Har verður nýggja felagsgrillin, Hugin & Munin, handað borgarunum til brúks klokkan 19. Tummas Lambastein fer at bjóða vælkomin og greiða frá um eldstaðin og grillina.

Grillin verður heit og til reiðar at leggja steikimat á kl. 19. Í meðan flytur Frits Johannesen fram røðu fyri at gera eitt sindur av stási burtur úr hesum nýggja elstaði Tórs og grillini Hugin & Munin. Úr Fuglafirði siga tey, at fólk mugu sjálvi hava steikimat við.

Fuglafjarðar Hornorkestur setur – sum næstan altíð, tá ið fuglfirðingar eiga okkurt at gleðast um - sín góða dám á løtuna við nøkrum væl blástum løgum. Annars verður eisini felagssangur. Øll eru vælkomin, siga fyrireikararnir.



**Ynskja fleiri starvsfelagar**

VÁR Í GONG
KJAK Á SÍÐU 14



**Suðuroy skal spara 43%**

KIRSTIN STRØM BECH
KJAK Á SÍÐU 12



# Rannvá í Listaglugganum

Í morgin 25. juni letur ein framsýning upp við listaverkum hjá Rannvá H. Mortensen í Listaglugganum í Havn.

Við á framsýningini eru umleið 25 listaverk, harav flestu eru málningar, sum eru málaðir til framsýningina í Listaglugganum. Umframt eru eisini nøkur eldri verk við á framsýningini.

Framsýningin í Dr. Jakobsensgøtu 15 í letur upp kl. 16.00, og verður Rannvá H. Mortensen til staðar.

Sosialurin

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*